# Falstíðindi í søgu og keldukritikkur

Nøkur amboð og nøkur dømi

Hans Andrias Sølvará, Fróðskaparsetur Føroya

Vísindavøka 24. september 2021

# Innihald

- Hvat eru falstíðindi?
- Nøkur amboð til at greina/avdúka falstíðindi
- Nøkur dømi úr føroyskari søgu um falstíðindi



# Hvat eru falstíðindi?

- Skeivar ella misvísandi upplýsingar, sum verða settar fram við tí fyri eyga at fremja ávís – t.d. politisk ella búskaparlig - áhugamál
- Falstíðindi sum hugtak hava fingið nógva umrøðu seinastu árini í samband við sosialar miðlar, Donald Trump, og seinast er tað eisini sett í samband við korona, men falstíðindi er eitt gamalt og kent fyribrigdi
- Dømi um falstíðindi finna vit eisini í føroyskari søgu - mytir
- Falstíðindi kunnu eisini fáa týdning fyri, hvørjar avgerðir verða tiknar

# Nøkur keldukritisk amboð - tummilsreglur

- Er søgan sannlík?
- Er søgan grundað á álítandi samtíðarkeldur?
- Er søgan sum heild samanhangandi
- Samsvarar søgan við aðrar keldur?
- Hevur frásøgufólkið nakra orsøk til ikki at siga rætt frá søguni?



# Eitt tilboð um sjálvstýri frá donsku stjórnini í mai 1906

- "Jóannes Patursson ... hævdede, at regeringen havde givet ham "tilbudet" som forketingsmand for Færøerne, medens regeringen senere hævdede, at det drejede sig om et privat forslag, fremsat af justitsminister P.A. Alberti"
- (Fortald frá 1953 til 1992)

- Er hendan søgan trúlig?



# Søgan um tilboðið og Alberti er ikki trúlig

- ”den daværende Justitsminister [var] beføjet til ikke alene i Kraft af sin Stilling som Justitsminister, men ogsaa efter Samraad med sine Kolleger paa den daværende Regerings Vegne at fremsætte det Tilbud, som indeholdes i den officielle Skrivelse fra Justitsministeriet til Færøernes Lagting af 1. Juni 1906.” (Svend Høgsbro, ferðslumálaráðharri í 1906-08, løgmálaráðharri í 1908-09 í fólkatinginum í oktober 1909)

- “Folketingsmand Patursson havde forebragt Sagen for Finansministeren“
(danska ráðharraprotokollin 6. mars 1906)


12. Møde.
Tirsdag d. 6. Marts 1906 i Marineministeriet.
Landbrugsministeren havde meldt Forfald.

Foretaget blev:
- Finansministeren forelagde Forslag til Lov om Lehr. d. IX' Hofbetjentes Pension. Billiges.
- Samme Minister forebragte et Spørgsmaal om Skatter og Afgifter paa Færøerne, nemlig saaledes, at der lægges flere Skatter paa samme til Brug for Amtskommunen. Folkethingsmand Patursson havde forebragt Sagen for Finansministeren.
- Statsraad næste Fredag.

Mødet hævet
J.C. Christensen

# Hvaðani stavar søgan um tilboðið og Alberti frá?

- ”Det er jo en bekendt Sag, at det er Hr. Patursson sammen med Alberti, der er Fædre til den saakaldte Tilbudsaffære. Dette Tilbud var jo af en finansiel Natur. – Hr. Patursson havde jo sammen med Alberti paataget sig at fremsætte Forslag om en ny Ordning af Færøernes Pengevæsen” (Oliver Effersøe í Dimmalætting 3. oktober 1908)


Dimmalætting.

Amtstidende for Færøerne.

Nr. 52. Løverdagen den 3dje Oktober 1908. 31te Aargang.

D'Herrer Købmænd!

Herr C. Ravnborg

Braunstein & Schibbye.

Man bedes henvende sig paa Hotel Djurhuus

Alberti paa Færøerne.

HAFNIA
ÆGTE EXPORT DOBBELT ØL

KØBMANDSHANDEL.

Mandag den 5te Oktober aabner Undertegnede sin Forretning, og tillader jeg mig herved at anbefale mig til et æret Publikum.

Specialitet: Kolonialvarer.

Ærbødigst
Meinhardt Jacobsen.

Krone Pilsener
fineste letteste skattefri Øl
De forenede Bryggerier

# Endi - ein søga um 1000 vápnaðar klaksvíksingar í 1955



# 14. SEPTEMBER

Nr. 42 Miðvikudagin 27. apríl 1955 9. árg.

# HART MÓTI HØRÐUM

## Klakksvíkingar hava 900 – 1.000 manns undir vápnum

### VERÐA IKKI TIKNIR VIÐ DANSKARI MAKT ALEINA

*Sum kunnugt hava Klakksvíkingar lagt trolaran Barm tvørtur um innsiglingina. Hetta varð gjørt leygarkvøld kl. 23. Hesin trolari Hákunar kom so loksins til nyttu. Musikkur spældi á landi hetta kvøldið. Tað svaraði aftur í Kallinum. Sama kvøld kl. 7.30 komu upp gøtuuppsløg sum ljóðaðu so: HART MÓTI HØRÐUM eru einastu ráð. Kl. 8 sendi Tórshavnar radio út at Klakksvíkar havn var stongd. Seinni varð hetta sent bæði á donskum og enskum*

lóður úr øllum útoyggjunum. Somuleiðis hava teir fingið hópin av byrsum og maskinbyrsum afturat tí sum teir sjálvir eiga. Skipið sum var komið við krúti og granatum til hvalaveiðistøðina við Áir varð tømt hesa náttina. Handgranatir í túsundatali eru gjørdar. Ov mikið er til av haglbyrsum, riflum og maskinbyrsum. Roknað verður við vápnaðum liði upp á 900—1.000 manns. Patrónir fáa Klakksvíkingar eisini sendandi — teir vita ikki frá hvørjum — bæði til riflur og byrsur.

*Hart móti hørðum*

Klaksvíkingar ætla seg at verja og ikki at gevast. Teir siga allir sum ein: Hart móti hørðum. Tað merkiliga er hent, at eisini nógvir av 5-prosenttistunum eru farnir í lið við 95-prosentistunum. Klakksvíkin verður ikki tikin við danskari makt aleina.

## Verkfallið

Verkfall er nú loksins lýst bæði á sjógvi og landi. Føroyingar eiga at standa saman sum ein maður. Vit eiga ikki at tola at útlendskt politivald verður beitt eftir landsmonnum og vit verða at fáa læknamálið inn í slíka rás at møguleiki verður til at loysa tað. Hesin møguleiki er at seta gerðarætt sum skal døma millum partarnar.

Frá í nátt er øll vinna niðurløgd og verður ikki upp aftur tikin fyrr enn krøvini hava fingið fram.

## Flaggdagurin í Havn

Kalt var í Havn flaggdagin, men kortini var hópur av fólki á Vaglinum og uttan fyri tinghúsið. Hornorkestrið og skótarnir gingu í skrúðgongu úr Vágsbotni og gjøgnum býin. Skrúðgongan støðgaði á tinghúsvøllinum. Hornorkestrið spældi fleiri løg. Marius Johannessen og Hanus við Høgadalsá hildu flagg røðurnar. Flagg var sjálvsagt á hvørji stong.

Vísindavøka